gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Lesandi skattskyldug í Føroyum

**Nú verður lættari hjá føroyskum lesandi uttanlands at varðveita fulla skattskyldu í Føroyum**

SKATTUR

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur eftir áheitan frá Meginfelag Føroyskra Studenta endurskoðað kunngerð nr. 15 frá 19. juli 1989 frá Líkningarráð Føroya um lesandi og lærlingar uttanlands. MFS vísti á, at fleiri av ásetingunum í kunngerðini hava avmarkað lestrarvirksemið hjá teirra limum.

Fíggjarmálastýrið hevur tí í samráði við Toll- og Skattstovu Føroya gjørt eina nýggja kunngerð, sum tekur av flestu av hesum avmarkingum. Størstu broytingarnar í nýggju kunngerðini eru:

- at tað nú verður gjørligt hjá lesandi at skifta útbúgving uttan at missa rættin til føroysku skattskylduna
- at tað nú ber til at nema sær eina útbúgving aftrat uttan at missa føroysku skattskylduna
- at tað nú er nóg mikið, at lesandi við byrjan av útbúgvingini skjalprógva, at tey byrja upp á eina útbúgving. Lesandi skulu tó altíð kunna prógva, at tey eru lestrarvirkin, um T&S biðjur um hetta. Lesandi skulu eisini framvegis boða T&S frá um møguligar broytingar í útbúgvingini

Størsti fyrimunurin hjá føroyskum lesandi uttanlands av at varðveita føroysku skattskylduna er, at tá sleppur hin lesandi undan at verða avmarkað skattskyldugur – tvs. 42,5% í skatti av bruttoinntøkuni – um arbeitt verður í Føroyum í t.d. summarfrítíðini. Ístaðin fáa tey lesandi sum fult skattskyldug rætt til botnfrádrátt (19 tkr.) í inntøkuni. Frádrátturin verður harumframt trektur fult út frá inntøkuni beinanvegin. Vanligt er annars at býta frádráttin javnt út á árið.

Nýggja kunngerðin verður lýst í Kunngerðarblaðnum í næstum, sigur Fíggjarmálastýrið í tíðindaskrivi.

# Skerd Almannastova í summar

SUMMARSTONGT

Nú hásummar er og fólk flest hava summarfrí, verður avgreiðslan á Almannastovuni í Havn, deildunum á Tvøroyri, í Klaksvík, í Runavík og á Hjálpitólamiðstøðini avmarkað til bert at umfata bráfeingistænastu í vikunum 30 og 31, sum eru dagarnir frá 24. juli til og við 3. august.

Hetta sigur Almannastovan í tíðindaskrivi.

Eingin viðtala verður í Vágum í vikunum 29 til og við 32. Tó fæst bráfeingishjálp við at venda sær til Almannastovuna í Havn um telefonina.

Skipað verður soleiðis fyri, at avgreiðslurnar eru stongdar, men telefonin verður opin hvønn dag uttan mikudag í tíðarskeiðnum frá kl. 10.00 til 12.00.

Almannastovan, deildirnar og Hjálpitólamiðstøðin hava vanligar avgreiðslutíðir aftur frá mánadegnum 6. august.

VIÐMERKINGAR

# Føroyski reiðarastudningurin er tríggjar til fimm ferðir hægri enn tann íslendski



Kári Petersen

Óli Jacobsen umber í mikudagsbløðunum landsstýrið (tað landsstýrið, ið samtykti skattafrádráttin hjá reiðarum) við, at landsstýrið bert gjørdi skattalættaskipanir (t. e. reiðarastudningsskipanir), sum líkjast teimum, ið eru í grannalondum okkara. Um hetta er heilt rætt, fari eg at lata lesaran døma um.

**Noreg er eingin fyrimynd**

Noreg hevur ikki fiskivinnu til høvuðsvinnu, og kann sostatt loyva sær nógv, sum vit og íslendingar ikki kunnu loyva okkum. Teir hava loyvt sær at stuðla fiskivinnuni og øðrum vinnum við skattalættum osfrv., so teirra vinnulív við tíðini er vorðið minni og minni effektivt, og minni og minni kappingarført. Samanumtikið hava norðmenn dugað illa at stýrt búskapi sínum. Tað er beinleiðis skelkandi at síggja, hvussu lítið Noreg hevur fingið burturúr oljuríkidømi sínum. Mált í BTÚ í keypsorku er Noreg bert 4% ríkari enn Danmark. Noreg er tí ikki nøkur hóskandi fyrimynd at liva upp til.

**Noreg hevur ongan rentustuðul ella rentufrádrátt**

Annars eigur eisini at vera havt í huga, at væl kann vera, at norskir fiskimenn fáa serligan frádrátt, men hinvegin fáa norðmenn (íroknað fiskimenn) ikki rentufrádrátt ella rentustuðul til sethúsabygging. Fyri at føroyskir og norskir fiskimenn skulu vera líkastillaðir, so skuldu føroyskir fiskimenn ikki fingið rentustuðul. Viðmerkjast skal, at fyri eitt nýtt hús uppá 1,2 mió. kr. er rentufrádrátturin 36.000 árliga ella 3.000 í stuðli um mánaðin.

**Ísland kann betur nýtast sum fyrimynd**

Tað er munandi rættari at samanbera okkum við Ísland, tí Ísland eins og vit hevur fiskivinnuna sum høvuðsútflutningsvinnu.

**Frádrátturin í Føroyum er upptil fimm ferðir hægri enn í Íslandi**

Men frádrátturin hjá fiskimonnum í Íslandi er bert ein brotpartur av tí hann er í Føroyum. Í Íslandi verður hann latin sum samdøgursfrádráttur, soleiðis at allir fiskimenn (ella reiðarar) fáa somu nyttu av honum. Frádrátturin er 691 ÍSK um dagin, t. e. um 60 FØK (føroyskar krónur) um dagin. Við 150 fiskidøgum um árið fær ein fiskimaður ein frádrátt uppá 9.000 FØK.

Í Føroyum er frádrátturin gjørdur so, at teir sum forvinna mest fáa størst frádrátt. Um t. d. ein maður forvinnur 500.000, so hevði hann við ongum frádrátti goldið 252.000 í skatti. Við frádráttinum í skattinum uppá 15% verður skattskylduga inntøkan 425.000 og sostatt verður skatturin 208.000 kr. Skattalættin er 43.500 kr. ella fimm ferðir hægri enn tann, ið íslendskir fiskimenn fáa. Tað kann somuleiðis vera torført at skilja, hví menn, sum forvinna eina hálva millión og meira árliga skulu hava skattalætta uppá 43.500 kr. ella 3.500 kr. um mánaðin. Um grundgevingin fyri at veita ein frádrátt er, at fiskimenn skulu hava ein frádrátt, tí teir eru nógv heimanífrá, so er torført at skilja, hví summir skulu hava fleri ferðir hægri frádrátt enn aðrir.

**Í Íslandi verður minstalønin goldin av reiðarunum**

Í Føroyum verður minstalønin goldin av skattgjaldaranum, meðan hon í Íslandi verður goldin av reiðarum. Harumframt er minstalønin í Íslandi umleið 7.000 kr. um mánaðin, meðan tann føroyska liggur millum 15.000 og 20.000 kr. um mánaðin, alt eftir, hvussu nógvar fiskidagar ein roknar við.

**Føroyska skipanin stuðlar reiðarunum nógv meir enn íslendska skipanin**

Niðurstøðan er tí, at føroyska skipanin stuðlar fiskimonnum og óbeinleiðis reiðarum nógv meira enn íslendska skipanin ger. Tað er tí ikki rætt, at landsstýrið hevur gjørt føroysku skipanina soleiðis, at viðurskiftini skulu vera eins og í Íslandi. Heldur er tað so, at føroyska skipanin í fyrsta lagi førir til sosialan ójavna. Í øðrum lagi førir skattalættin hjá fiskimonnum til, at reiðarar kunnu geva fiskimonnum lægri hýru enn annars og føroyska skipanin er tí ein studningsskipan til reiðarar. Ein tílík studningsskipan førir til yvirkapasitet og ineffektivitet í føroysku fiskivinnuni.

**Skattur og frádráttur hjá fiskimonnum, samanbering millum Ísland og Føroyar.**

**Føroyska skipanin.**

**Inntøka og skattur hjá persóni uttan fiskimannafrádrátt** (kr.) | **Inntøka og skattur hjá persóni við fiskimannafrádrátti** (kr.)

| Inntøka | Skattur | Inntøka | Frádráttur | Skattskyldug Inntøka | Skattur | **Spart í skatti** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 200.000 | 77.790 | 200.000 | 30.000 | 170.000 | 60.390 | **17.400** |
| 300.000 | 135.790 | 300.000 | 45.000 | 255.000 | 109.690 | **26.100** |
| 400.000 | 193.790 | 400.000 | 60.000 | 340.000 | 158.990 | **34.800** |
| 500.000 | 251.790 | 500.000 | 75.000 | 425.000 | 208.290 | **43.500** |

**Íslendska skipanin.**

| | **Spart í skatti** |
|---|---|
| Frádrátturin er **60 kr.** (føroyskar) um dagin. Við 150 fiskidøgum verður árligi frádrátturin: | **9.000** |

Keldur:
Heimasíðan hjá Toll- og Skattstovuni
Heimasíðan hjá Altinginum

gult13 cyan13 magenta13 svart13

ítróttur

Nr. 128 • leygardagur • 7. juli 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

**Í týsdagsblaðnum verður stór frásøgn frá Oyggjaleikunum**

# NSÍ roynir at byrja av nýggjum

Tað hevur ikki gingið væl hjá NSÍ í ár



**Men tað verður sera torført í Gundadali, har B36 higartil í ár hevur vunnið allar landskappingardystirnar**

Í fyrsta umfarinum í landskappingini í ár var B36 í Runavík. Úrslitið var 0–0, og spurningurin var, um úrslitið skuldi takast sum ábending um, at bæði hesi liðini fóru at standa seg væl í ár, ella um talan var um eitt gott úrslit hjá heimaliðnum ella hjá B36.

Síðani tá hevur gongdin hjá NSÍ ikki verið góð. Eftir tapið á Eiði síðsta vikuskifti hevur talan verið um fundarvirksemi, har keðiliga støðan hevur verið uppi og vent, og nú verður roynt meiri ella minni at byrja av nýggjum.

Ofta hevur NSÍ staðið seg væl í Gundadali, og tað tykist vera ein ávís vón um brúkiligt úrslit hesa ferð.

Síðani málleysa javnleikin í fyrsta umfarinum hevur tað gingið væl hjá B36. Burtursæð frá dýra 3–1 svipsaranum í Gøtu í fjórða umfarinum hevur árstalsfelagið vunnið hvørja ferð, og teir eru harvið í løtuni einasta veruliga hóttanin ímóti suverenu gøtumonnunum, sum longu í gjárkvøldið gjørdu 10. dystin burturav sær (KÍ skuldi spæla í Gøtu klokkan 18.30).

Dysturin í Gundadali í dag verður klokkan 16. Onkrir av spælarunum ætla sær í brúdleyp hjá Sámali Joensen í GÍ, og onkrir fara í brúdleyp hjá NSÍ spælaranum Dániali Hansen.

Dánial Hansen hevur fingið sær konu, og hevur tískil ikki umstøður at vera á NSÍ liðnum (seinast var hann ikki ímillum teir fyrstu ellivu). Sjúrður Jacobsen var leikbannaður seinast, men hann verður ikki við hesa ferð. Í vikuni hevur hann fingið ein vøddaskaða. Kári Hansen er framvegis skaddur.

Hjá B36 verður Jens Kristian Hansen ikki við. Í samanstoyti við VB málverjan síðsta sunnudag brákaði landsliðsmaðurin eitt rivjabein. Klæmint Matras er leikbannaður, og tað er sera ivasamt, um Pól Thorsteinsson verður við. Síðsta sunnudag noyddist hann at fara av vøllinum, tí vøddaskaðin argar framvegis sera meint.

# Mannfallið er framvegis stórt á Toftum

**Umframt teir, sum vóru við í Miðvági, er liðformaðurin hjá HB tøkur, tá teir fara á Svangaskarð**

Hóast tað sambært skipanina skuldu havt verið fimm dystir á skránni í morgin, so sigur veruleikin, at tað bara verður 1. deildarfótbóltur á Toftum. HB skal spæla á Svangaskarði, og dysturin hevur í fyrstu atløgu stóran týdning í kappingini um triðja plássið.

Um dreymurin hjá B68 av vinna heiðursmerkir ikki skal vera veruleika fjarður í summarsteðginum, so er neyðugt hjá B68 at vinna øll stigini. Og HB hevur heldur ikki ráð at missa nakað.

**Fleiri burturi frá**

Hjá B68 eru framvegis fleiri spælarar burturi frá. Hans Fróði Hansen var leikbannaður seinast. Hann er tøkur aftur, og tað kemur væl við, tí sannførandi aftasti verjumaðurin tær seinastu ferðirnar, Jan Petersen, er leikbannaður.

Jákup Eli Olsen er burturstaddur, og tað er Jann Ingi Petersen eisini. Jan C. Dam er framvegis skaddur.

Hjá HB er Rúni Nolsøe við aftur. Hann var leikbannaður í Miðvági. Tað verður framvegis mettur sum stórur smeitur í HB, at Andrew av Fløtum og Hans á Lag hava verið so leingi burturi frá. Uni Arge hevur ikki vant í hesi vikuni, og hann verður ikki við.

Eingin av núverandi HB spælarunum hava roynt seg í B68, meðan fleiri av B68arunum áður hava spælt í HB: Jóannes Jakobsen, venjarin, Hans Fróði Hansen, Súni Fríði Johannesen og John Heri Dam og so Jákup Eli Olsen og Jan C, Dam, sum kortini ikki eru við hesa ferð.




*B68 skal vinna fyri at kunna gera seg galdandi millum teir bestu*